# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað var gott, at foreldur míni vórðu funnin aftur. Nú fingu tey kortini seinasta orðið í málinum*

*(Ketil Teisen)*

# Ríkfólk í New York dømd fyri trælahald

**Eini millióningahjún í New York kunnu fáa upp í 40 ára fongsul fyri trælahald**




*Mahender Sabhnani á veg úr rættarhølinum saman við løgregluni*

*(Mynd: AP)*

Rætturin í New York var ikki í iva, tá hann í gjár skuldi taka støðu í einum máli, sum ákæruvaldið hevði reist um trælahald. Tann 51 ára gamli Mahender Sabhnani og 45 ára gamla kona hansara, Varsha Sabhnani, vóru sek í trælahaldi.

Sabhnani-hjúnini reka eina heimsumfatandi fyritøku, sum selir luktilsi og smyrsl av ymsum slagi. Fyritøkan hevur gingið væl, og tey bæði hoyra til tað betra slagið við fleiri milliónum dollarum í bankanum, sigur CNN.

Tað var tí einki óvanligt, at tey valdu at fáa sær tvær indonesiskar kvinnur at hjálpa sær við tí dagliga húsarhaldinum, men fyrr í ár kom fram, at tær báðar kvinnurnar høvdu arbeitt undir ómenniskjaligum korum. Undir rættarmálinum upplýsti ákærin, at kvinnurnar høvdu arbeitt meiri enn 18 tímar um samdøgrið, og at mánaðarlønin var millum 500 og 800 krónur. Eisini kom fram, at hjúnini høvdu tikið passini frá teimum, sum tær ikki skuldu sleppa av landinum.

Revsingin fyri trælahald í USA er upp í 40 ára fongsul.

# Fekk horvin hjún í trolið

**Eini eldri donsk hjún, sum hvurvu í summar, eru nú funnin. Ein trolbátur fekk líkini í trolið í gjár**

Hjúnini Ruth og Finn Teisen, sum búðu á oynni Strynø, fóru í summar til Ærø við stuttleikabátinum, sum tey ætlaðu at selja, tí ein maður á Ærø hevði sagt seg vera sinnaðan at keypa bátin. Fólk á Ærø sóu bátin liggja fyri akkeri, men Ruth og Finn Teisen vóru ikki at síggja.

Løgreglan leitaði væl og leingi á landi og á sjónum, men til fánýtis. Tann 25 ára gamli maðurin, sum hevði víst bátinum áhuga, bleiv tikin, og hann viðgekk at hava stungið hjúnini og at hava tveitt tey í havið, men noktaði seg sekan í manndrápi.

Seinnapartin í gjár fekk ein trolbátur líkini av hjúnunum í trolið. Tað vísti seg, at tey vóru samanbundin.

# Putin tekur av

**Vladimir Putin sigur seg vera til reiðar at taka við sum russiskur forsætisráðharri, um Dmitrij Medvedev vinnur forsetavalið**

Vladimir Putin verður eftir øllum at døma russiskur forsætisráðharri, tá hann gevst sum forseti.

Herfyri segði Putin, at hann styðjaði Dmitrij Medvedev sum valevni á forsetavalinum, sum verður 2. mars, og dagin eftir takkaði Medvedev við at siga, at verður hann forseti, vil hann fegin hava Putin til forsætisráðharra.

Í gjár tók Putin av tilboðnum. Hann legði afturat, at valdsbýtið millum forsetan og forsætisráðharran verður tað sama sum nú, men politiskir eygleiðarar í Moskva siga, at sum forsætisráðharri fer Putin framvegis at hava tað avgerandi orðið í russiskum politikki í komandi árum.



*Vladimir Putin og Dmitrij Medvedev skulu eftir ætlanini stýra Russlandi tey næstu árini*

## STUTT SAGT

### Russar ávara um Kosovo

Russiska uttanríkisráðið ávarar um, at stríðið um Kosovo kann enda sum ein kreppa, sum eingin kann hava tamarhald á. Alt bendir á, at USA, Bretland, Frakland, Týskland og onnur lond fara at viðurkenna Kosovo sum eitt sjálvstøðugt land, nú einki røkist fyri semju. Serbia hevur gjørt av at leggja málið fyri altjóða dómstólin í Haag og hevur biðið Russland og Kina leggja trýst á fyri at fáa nýggjan fund um Kosovo. Serbiski forsetin, Boris Tadic, segði í gjár, at so leingi hann er forseti, fer Serbia ikki at góðtaka, at Kosovo verður sjálvstøðugt.

### Styðjar McCain

Joe Lieberman, sum situr í amerikanska umboðsmannatinginum, sigur nú, at hann heldur republikanaran John McCain vera tann rætta mannin at taka við sum forsrti eftir George W. Bush. Joe Lieberman var limur í demokratiska flokkinum fyrr, og hann var eisini varaforsetaevni hjá Al Gore, tá hann stillaði upp ímóti Bush. Nú er Lieberman uttanflokkatingmaður, men hevur valt at styðja John McCain, sum roynir at gerast forsetavalevni hjá republikanska flokkinum.

### Órættvíst val

OSCE sigur nú, at valið í Kirgisistan um vikuskiftið leyk ikki tær ásetingar, sum kunnu tryggja, at valið var rættvíst. OSCE vísir millum annað á, at týðandi andstøðupolitikarar sluppu ikki at stilla upp, og at andstøðan fekk nóg illa orðið í teimum almennu fjølmiðlunum. Valnevndin segði í gjár, at tá 80 prosent av atkvøðunum vóru taldar, hevði flokkurin hjá Bakijev, fingið næstan 50 prosent. Men andstøðan sigur, at myndugleikarnir hava svikað við uppteljingini.